# • TINGLÝSINGAR

**Matrikel 806 N , Tórshavn**
Beliggende
x
Sælger
Marjun Smith
Køber
Eivind Mortan Weihe f. 25.04.42
Købesum
1.750.000 Dkk

**Matrikel 65 B , Depil**
Beliggende
x
Sælger
Julius Johannesen
Køber
Hvannasunds kommuna
Købesum
512.049 Dkk

**Matrikel 1 ÆC , Hoyvík**
Beliggende
Kristiansgøta 38
Sælger
Dan Kári Joensen, f. 10.06.1974
Køber
Eilin Joensen f. 21.08.75
Købesum
550.000 Dkk

**Matrikel 10 AF , Hvalvík**
Beliggende
x
Sælger
sp/f J.J.
Køber
Suzanne Hultgren f, 07.12.55
Købesum
1.294.447 Dkk

**Matrikel 10 R , Hvalvík**
Beliggende
x
Sælger
sp/f J.J.
Køber
Jan Joensen f. 13.06.68
Købesum
850.000 Dkk

**Matrikel 67 C , Nes - Eysturoy**
Beliggende
x
Sælger
Nes kommuna
Køber
Rógvi Hansen f. 14.03.40
Købesum
54.782 Dkk

**Matrikel 90 C , Trongisvágur**
Beliggende
x
Sælger
Mina Debes
Køber
Kaj Midjord f. 29.09.57
Købesum
255.000 Dkk

**Matrikel 1076 M , Tórshavn**
Beliggende
Stiðjagøta
Sælger
P/F Byggitek
Køber
SP/F Bilrøkt Fastogn
Købesum
5.780.000 Dkk

**Matrikel 712 D , Tórshavn**
Beliggende
x
Sælger
Frida Mellemgaard m.fl.
Køber
John Andy Frank Hansen f. 22.02.36
og Helena Hansen f. 22.03.37
Købesum
1.300.000 Dkk

**Matrikel 205 O , Vestmanna**
Beliggende
x
Sælger
Samuline A.S. Joensen
Køber
Judith Sofie Joensen
Købesum
0 Dkk

**Matrikel 298 B , Vestmanna**
Beliggende
x
Sælger
Áki Gaardbo Olsen, f. 30.06.1977
Køber
Mads H.Jespersen f. 05.01.80 og
Ann Mari Egholm f. 25.06.79
Købesum
146.000 Dkk

**Matrikel 23 B , Fámjin**
Beliggende
x
Sælger
Jacob Albinus Jacobsen
Køber
Elin A.P.L.A. Jacobsen f.20.08.73
Købesum
50.000 Dkk

**Matrikel 23 B , Fámjin**
Beliggende
x
Sælger
Jacob Albinus Jacobsen
Køber
Jeanna Karin á Lágabø
Købesum
50.000 Dkk

**Matrikel 23 B , Fámjin**
Beliggende
x
Sælger
Jacob Albinus Jacobsen
Køber
Niels Michael Jacobsen
Købesum
50.000 Dkk

**Matrikel 240 A , Kollafjørður**
Beliggende
x
Sælger
Búgvið eftir Karl Samuelsen
Køber
Elsa Poulina Samuelsen f. 11.10.30
Købesum
0 Dkk

**Matrikel 55 A , Nes-Vágur**
Beliggende
x
Sælger
Búgvið eftir Dion Alfred Splidt
Køber
Maria Splidt 03.03.31
Købesum
0 Dkk

**Matrikel 55 B , Nes-Vágur**
Beliggende
x
Sælger
Búgvið eftir Dion Alfred Splidt
Køber
Maria Splidt 03.03.31
Købesum
0 Dkk

**Matrikel 10 , Sandavágur**
Beliggende
x
Sælger
Búgvið eftir Meinhard Dam
Køber
Arndis Lindberg og Maud Petersen
m.fl.
Købesum
0 Dkk

**Matrikel 10 , Sandavágur**
Beliggende
Skraddaragøta 7
Sælger
Meinhard Dam
Køber
Magnus Simonsen f.09.02.81
og Sigg Carolina á Stongunum
f.28.07.84
Købesum
660.000 Dkk

# The Ghost skrivað sáttmála

**Leygardagin skrivaðu Filip Mortensen og Urbanus Olsen undir ein sera vælljóðandi plátusáttmála við ongan annan enn Rob Da Bank, ein av høvuðspersónunum í BBC Radio 1, í Onglandi**



*Filip og Urbanus: - Hetta er tað besta, sum kann henda fyri okkum. Vit hava arbeitt. og vit hava arbeitt hart!*

*Mynd: Eyðun Müller Thomsen*

**TÓNLEIKASÁTTMÁLI**
*Orð og myndir:*
*Eyðun Müller Thomsen*
*eydunnudye@hotmail.com*

Tað er gjøgnum felagið "Sunday Best", sum er stýrt av Rob Da Bank, og sum er úti eftir nýggjum og frískum tónleiki, at sáttmáli hesaferð er gjørdur við The Ghost.

The Ghost hava eitt ár á bakið. Og við teirra extremu útstráling og ótrúliga fangandi elektroløgum, hava teir stormað Norðurlond og nú eisini restina av Europa. Alt hetta afturvið vokalunum frá Mr. Mortensen himself.

*"Alt hetta við sáttmálanum er nakað, sum hevur verið í luftini líka síðan desember í fjør. BBC hevur ligið aftanfyri ryggin á okkum og bíðað. Vit hava ikki viljað skrivað undir beinanvegin, tí nógvar broytingar skuldu gerast fyri, at vit tordu at leggja The Ghost í ovnin. So vit hava so við og við sent nýggj løg til teirra, og tað hevur bara víst gott úrslit. "* sigur Filip Mortensen.

## The Ghost "Fløgan"

Sáttmálin sigur í stuttum, at The Ghost skal í ár útgeva eina heila fløgu, sum síðani verður distribuerað av BBC Radio & Sunday Best. Hon verður at fáa kring allan knøttin, tó ikki í Norðurlondum, herundir Føroyum. Hetta virkar kanska eitt sindur løgið, men um fløgan skal kunna fáast her í Føroyum, skal tað gerast av The Ghost sjálvum ella øðrum.

*"Eg haldi tað vera sera áhugavert, um vit góvu fløguna út uttan fyri Føroyar fyrst. Tí so kann man veruliga merkja, hvat finst her í Føroyum, um fólk eru sinnað at bíleggja fløguna uttanlanda frá o.s.v. Tað hevði verið stuttligt at funnið útav.."*

## Summar 2008, festival, konsert & festival!

Summarið 2008 verður veruliga tað, sum setir alt í gongd fyri The Ghost. Duo'in troppar upp á fleiri og fleiri stórkonsertum og festivalum, m.a. í juli mánað. Tá fara teir at framføra í Tjekkia á festivalinum "Rock For People" og á stóra bretska festivalinum "Bestival" við nøvnum so sum My Bloody Valentine, Aphex Twin og Flaming Lips. Og nú tá sáttmálin er komin í gildi, verður óivað nógv meira væntandi og óvæntandi at hoyra og síggja til The Ghost.

*"Hetta er tað besta, sum kann henda fyri okkum. Vit hava arbeitt. og vit hava arbeitt hart!. Bæði eg og Urbanus kunnu frítt siga, at hetta er okkara lívs dreymur og vit steðga ikki her."*

## BBC, MTV, FOX TV o.s.v...

Umframt at BBC verturin Rob Da Bank hevur fingið sáttmála við The Ghost, hava eisini aðrar stórar fyritøkur eisini verið í luftini. Bæði MTV og FOX NEWS hava havt fólk, sum leita eftir fangandi tónum/jinglum til teirra ymsu sendingar. Her verður ein sersáttmáli gjørdur soleiðis at t.d. MTV fær rættindi til at brúka tónleikin sum ífylla til ymsu sendingarnar. Men hettar er ikki farið ígjøgnum enn.

*"Konsertirnar og festivalarnir hava fyrsta prioritet beint nú og summarið út. Og fløgan vil koma so leypandi aftaná. Men tað skal verða sagt, at Føroya fólk og øll onnur kunnu einki annað enn at vera klár, tá fløgan lendir. Vit vilja gera tað hamrandi, sprenandi frekt og stuttligt. So come on baby! Let's do this!"*

Kalendarin hjá The Ghost hevur havt nógv tømt pláss, men nú broytist alt.

Ætlaninar eru nógvar, og ein av teimum er at fáa eitt sjónbandalag í verk. Tað hevur serliga verið hugsað um at fingið ein japanesara at produsera fyrsta video'ið. So tað verður allarhelst okkurt, sum hevur við teknirøðir/animatiónir at ger, nú hvørt av teirra løguml á Myspace hevur sína egnu Animemynd tilknýtta.

*"Tær japonsku tekningarnar síggja vit sum nakað styrkjandi til okkara tónleik á tann hátt, at tær eru skríggjandi litfullar, líka sum tónleikurin, og sum oftast fullar av charme og so rigga tær bara skide gott...sum vit...næstan!... Heh.."*

## Filip & Urbanus

Filip og Urbanus greiða frá, at teir kundu ikki funnið ella valt ein betri partnara enn teir sjálvar. Alt er akkurát, sum tað skal vera og arbeiðsviljin er í toppklassa. Urbanus er 20 ára gamal og Filip verður 20 ár dagin í dag. Ein tann stóri stopparin í allari processini hevur verið skúlin, men nú tá báðir tveir gera studentaskúlan lidnan til summarið 2008, so tað verður munandi lættari hjá bólkinum at flyta mørk. Stór mørk.

*"Nógv, sum vit tosa við og hoyra frá, siga London verða tað síðsta staðið at skula byrja nakað innanfyri tónleik. Men vit síggja tað heldur sum tað fyrsta."*